## Føroyingur skipari á Havnarundferð

Edmund Sofus Jacobsen, ið seinastu árini er vorðin kendur sum tónleikafyriskipari í Keypmannahavn, er í hesum døgum í venjing sum skipari hjá DFDS Havnerundfart. Edmund er skipsførari og skipsverkfrøðingur og skal nú sigla ferðafólk í eyðkendu lágu bátunum runt í kanalunum í Keypmannahavn. Enn er ikki greitt hvørjar avleiðingar hetta fær fyri tónleikin á Skarvi, har Edmund hevur verið fyriskipanarligur primus motor




## Skarv uttan royk

Hetta vikuskiftið letur føroyska vertshúsið í Keypmannahavn, Skarv, upp í nýggjum roykfríum hami. Fyrstu ferð í 33 ára søguni hjá føroyska vertshúsinum verður ikki loyvt at festa sær í eina sigarett aftur við Føroya Bjór ølini ella eftir at hava verið á dansigólvinum. Tað verður Jens Marni Hansen úr Kollafirði, ið fer at standa fyri undirhaldinum, og maðurin, ið plagdi at rópa seg næst stuttligasta mann í Kollafirði, stendur vanliga fyri góðum framførslum.

# Nýggj skúlastova á Velbastað

**Tá børn í fyrsta til triðja flokki á Velbastað komu í skúla í morgun, var tað til nýggjar, ljósar og góðar karmar. Fyri at nøkta skúlatørvin hjá alsamt vaksandi bygdini, hevur skúlin fingið eina nýggja skúlastovu**

SKÚLABYRJAN

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*
*myndir: Edith Johannesen*



*Spenningurin var stórur, tá børnini í øðrum og triðja flokki komu inn í garderobuna í nýggju skúlastovuni*



*Stóru og ljósu karmarnir vóru góðir at beistast í*



*Skúlin byrjaði bleytt við at sita í rundingi og spæla spøl*

Sum vit skriva aðrastaðni í blaðnum lat í morgun nýggi frískúlin upp á Velbastað, men aðrastaðni í bygdini fóru børn eisini í skúla, og fyri børnini í Velbastaðarskúla, var dagurin í dag heilt serligur, tí umframt nýggjan fyrsta flokk, so lat skúlin dyrnar upp við eini nýggjari og snøggari skúalstovu, ið skal hýsa børnunum, ið ganga í fyrsta til triðja flokk.

### Ein stór skúlastovu

Skúlastovan er 120 fermetrar og lærararnir á skúlanum hava brúkt stóran part av summarfrítíðini til at innrætta skúlastovuni á best møguligan hátt. Skúlastovan er ein standardloysn, ið er komin úr Danmark, og sett upp á Velbastað. Mannbjørn Mortensen, skúlastjóri, sigur við Sosialin, at talan er um bygning, ið vanliga skuldi hýst tveimum skúlastovum á 60 fermetrar, men í staðin hevur man á Velbastað valt eina stóra stovu, ið verður innrættað við lesikrókum, trappum og ymiskum skotum, har børnini fáa verið. Við hesum verður roynt at skapa eitt annað umhvørvið enn vanliga umhvørvið, har børn sita og glgða í nakkan á hvør øðrum.

### Trongligt í gamla skúla

Fyri børn og lærarar er nýggja skúlastovan ein góð og neyðug betran av umstøðunum.

- Umstøðurnar eru øgiliga, øgiliga nógv betur, enn vit hava havt seinastu trý árini. Í fjør vóru til dømis 54 børn á skúlanum, ið var bygdur til at hýsa 30 børnum. Tá var øgiliga trongt, So nýggja stovan hjálpir væl, greiður skúlastjórin frá.

Nógv bygging er á Velbastað. 29 grundstykki eru útstykkjaði, og fleiri foreldur hava longu flutt síni børn til Velbastaðar, hóast húsini ikki eru liðug enn. Men Mannbjørn Mortensen væntar, at tá húsini í nýggju útstykkingini fara at standa liðug, fer trýstið skúlan at vaksa, og við nýggju skúlastovuni er skúlin fyrireikaður til hetta trýst.

### Góðar umstøður

Mannbjørn Mortensen er væl nøgdur við nýggju skúlastovuna.

- Eg eri yvirraskaður av, hvussu væl hetta er gjørt. Í stovuni eru ljóðviðurskiftini sera góð, handverkið er gott og stovan er ljós. Nú vita vit sjálvandi ikki, hvussu tað verður í vetur, her er sera vindhart her heima. Men teir, sum hava bygt stovuna garantera, at hon verður standandi, sigur Mannbjørn Mortensen.

Nú frískúlin byrjar á Velbastað, er nærliggjandi at spyrja skúlastjóran um, hvørjar tankar hann hevur gjørt sær, um at ein annar skúli letur upp í somu bygd. Men Mannbjørn greiður frá, at har á skúlanum hava tey havt so nógv um oyrini við at gera klárt í nýggju skúlastovuni, at tey als ikki hava havt stundir at hugsa um annað enn tað.

Næmingar heiman av Velbastað fara í framhaldsdeildina í Kommunuskúlanum í Havn.

Í ár byrja tólv næmingar í fyrsta flokki, teir ganga í nýggju skúlastovuni saman við trettan børnum úr øðtum og triðja flokki.

Á skúlanum eru seks lærarar og vanliga eru triggir á hvørjari deild í senn.

*Børnini hugnaðu sær, og tyktust at vera glað um aftur at sleppa í skúla*



**FAKTA**

**Velbastaðarskúli er býttur upp í tríggjar deildir:**
- fyrsta til triðja flokk
- fjórða og fimta flokk
- sætta og sjeynda flokk